NÁM

# Breytarverkætlanin 2. árið – Fyrireikingarbreyt

# Leiðbeining

**August 2020**

Krøv til breytarverkætlanina eru ásett í lóg, kunngerð og námsætlan. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlan eru markað við skákskrift.

## Endamál

*Endamálið við breytarverkætlanini er, at næmingurin sjálvur skal royna at arbeiða við at fara til botns í og bera fram eitt fakligt greiðsluevni innan eitt sjálvvalt øki. Næmingarnir skulu vísa, at teir sjálvir eru førir fyri at velja út, nýta viðkomandi tilfar og eru førir fyri gera kritiskar metingar á fakligum grundarlagi. Arbeiðið við breytarverkætlanini skal menna lestrarførleikar næmingsins, soleiðis at skilja, at teir umvegis eitt skrivligt avrik vísa, at teir megna at hava yvirlit, viðgera, skipa, taka saman um og bera fram eitt fakligt greiðsluevni.*

Arbeiðið við breytarverkætlanini er lestrarfyrireikandi og hevur til endamáls at fyrireika næmingarnar til arbeiðshættir, sum teir væntandi skulu brúka, tá teir útbúgva seg víðari. Við breytarverkætlanini fáa næmingarnir betri umstøður enn við dagligu undirvísingini annars at arbeiða sjálvstøðugt og at fordjúpa seg í einum sjálvvaldum evni.

## Ítøkiliga málið

*Málið við breytarverkætlanini er, at næmingurin*

- *skal vísa, at hann megnar at fara til botns í fakinum og at seta seg inn í nýggj faklig øki*

At fara til botns í fakinum merkir m.a., at næmingurin við fakligum háttaløgum og ástøði skal vísa evni at viðgera eitt avmarkað evni og harvið ogna sær nýggjar førleikar og vitan, sum kunnu brúkast í nýggjum samanhangi.

- *skal vísa, at hann megnar at velja út, nýta og seta saman faklig háttaløg*
- *skal hava tamarhald á viðkomandi fakligu málum í lærugreinunum, skrivað verður í*

Í breytarverkætlanini arbeiðir næmingurin við eini uppgávuorðing, sum vanliga fevnir um meira enn eina lærugrein. Næmingurin skal kunna brúka teir fakligu førleikarnar, sum eru viðkomandi fyri uppgávuorðingina, og vísa, at hann dugir at velja og brúka viðkomandi háttaløg at náa málunum fyri breytarverkætlanina. Næmingurin skal vísa, at hann hevur eina fakliga vitan, sum verður sett í nýggjan samanhang.

- *skal velja út, viðgera og skipa týðandi tilfar*

Næmingurin eigur sjálvur at finna og velja út viðkomandi tilfar, men vegleiðararnir skulu sjálvandi koma við góðum ráðum og ávísingum. Tað verður ikki væntað, at næmingurin frammanundan hevur yvirlit yvir ólisið tilfar og sjálvstøðugt er førur fyri at finna og velja alt tilfarið.

- *skal vísa, at hann fakliga megnar at bera fram*

Næmingurin skal kunna skriva eitt uppgávusvar við fakligum háttaløgum og ástøði og á hóskandi fakmáli, samstundis sum teksturin skal verða samanhangandi og væl skilligur. Uppgávusvarið skal skrivast til ein áhugaðan lesara, sum skilir samanhangin, men ikki neyðturviliga skilir serlig faklig hugtøk og serligar fakligar samanhangir. Næmingurin skal vísa, at hann megnar at tillaga serliga akademiska málið í tilfarinum til vanliga fakliga málið, sum verður brúkt á miðnámi.

- *til fulnar svarar setta greiðsluevninum (spurninginum) soleiðis at skilja, at samsvar er millum uppgávuorðing og uppgávusvar*
- *skal hava skil á frásagnarháttinum í eini fakligari uppgávu, t.d. innihaldsyvirlit, endurgeving, notur, keldur, bókmentaskrá o.tíl.*

Ymsu lærugreinarnar hava ymsar siðvenjur fyri skrivligar uppgávur. Tí er týdningarmikið at leggja dent á, at óansæð lærugreinar skal uppgávusvarið lúka grundleggjandi formellu krøvini, sum verða sett eini breytarverkætlan.

# Karmarnir

*§ 22. Breytarverkætlanin á 3. ári verður skrivað í lærugrein á A-stigi í tvørfakligum samstarvi við eina aðra lærugrein á A-, B- ella C-stigi. Á fyrireikingarbreytini verður breytarverkætlanin skrivað 2. árið í lærugrein á A- ella B-stigi í tvørfakligum samstarvi við eina aðra lærugrein á A-, B- ella C-stigi.*

Tað er týdningarmikið, at dentur verður lagdur á, at eitt fakligt øki og eitt fakligt greiðsluevni eru grundarlag undir breytarverkætlanini. Lærugreinarnar skulu síðan veljast, soleiðis at tær samsvara fakliga greiðsluevninum.

*Stk. 2. Næmingurin skal sjálvur velja lærugreinar, øki og evni.*

Næmingurin kann ikki skriva um hvat sum helst. Um økið, næmingurin hevur valt, ikki í nóg stóran mun er fevnt av lærugreinini, ella um vegleiðararnir meta, at fakligu málini í breytarverkætanini ikki kunnu náast, má næmingurin velja annað øki ella aðra lærugreinasamanseting.

*Stk. 3. Verkætlanin verður skrivað í tíðarskeiðinum 15. oktober til 1. mars. 10 skúladagar vera nýttir til verkætlanina, harav fimm teir síðstu skulu liggja saman. Millum fyrsta og síðsta verkætlanardag skulu í mesta lagi vera 6 vikur. Uppgávuorðingin skal latast næminginum, tá fyrsti verkætlanardagur byrjar. Verkætlanin skal latast inn seinasta verkætlanardag. Teir dagarnar, næmingurin skrivar verkætlan, verður vanliga undirvísingin niðurløgd.*

Skúlin avger, nær, í tíðarskeiðinum 15. oktober til 1. mars, verkætlanartíðarskeiðið er, og næmingarnir eiga at verða kunnaðir um hetta, tá skúlaárið byrjar. Atlit eigur m.a. at takast at øðrum skrivligum arbeiði hjá næmingunum. Verkætlanartíðarskeiðið kann fevna um í mesta lagi seks vikur og í minsta lagi tvær vikur. Teir síðstu fimm verkætlanardagarnir skulu liggja saman í endanum á verkætlanartíðarskeiðinum, meðan skúlin avger, nær í verkætlanartíðarskeiðinum hinir fimm

verkætlanardagarnir eru. Næmingurin skal fáa endaligu uppgávuorðingina útflýggjaða á fyrsta verkætlanardegnum, og breytarverkætlanin skal latast enn á síðsta verkætlanardegnum.

Í summum førum er skilagott, at allir verkætlanardagarnir ikki liggja saman, eitt nú tá talan er um royndararbeiði, sum kann taka tíð, ella um avtalur við uttanhýsis partar krevja tað.

Um næmingurin skal gera royndararbeiði í sambandi við breytarverkætlanina, skal hann hava atgongd til viðkomandi høli og útgerð. Um royndararbeiðið skal gerast á skúlanum, skal ein faklærari vera til staðar av trygdarávum.

Í verkætlanardøgunum skal næmingurin hava rímiliga atgongd til viðkomandi hentleikar, so sum bókasavn og royndarútgerð. Skilagott er eisini, at teknisk hjálp í rímiligan mun er tøk til næmingin.

*Stk. 5. Við støði í grundaðari skrivligari umsókn frá næmingi kann leiðari útbúgvingarstovnsins gera av, at breytarverkætlanin kann verða skrivað í trimum lærugreinum ella bert í einari A-lærugrein. Endamál, mannagongd og treytir annars eru lýst í námsætlanini fyri breytarverkætlanina.*

Næmingurin skal í umsóknini grundgeva fyri síni ætlan. Næmingurin skal hava eitt serliga gott hugskot, sum betur kemur til sín rætt í einari ella trimum lærugreinum. Um næmingurin vil skriva breytarverkætlan í einari lærugrein, skal hann í umsóknini vísa á, hvussu hann ætlar at náa settu málum fyri breytarverkætlanina, herímillum málum um at seta saman ymisk faklig háttaløg.

# Verkætlanarøki og uppgávuorðing

*Skúlin ger av, hvør lærari skal vegleiða einstaka næmingin í hvørji lærugrein. Vegleiðingin skal skiljast sum góð ráð og skilagóðar ábendingar í sambandi við sjálvt valið og arbeiðið við verkætlanini. Vegleiðingin skal skipast soleiðis, at tað er greitt, nær lærarin er vegleiðari, og nær hann er metari. Tí má vegleiðingin ikki vera ein døming/meting av týðandi pørtum av svarinum. Hinvegin skal vegleiðingin skipast soleiðis, at næmingurin fær høvi at taka ímóti vegleiðing í øllum verkætlanartíðarskeiðinum heilt fram til innlating.*

Vanliga vera lærararnir, sum næmingurin hevur, eisini settir sum vegleiðarar hjá næminginum. Skúlin kann tó seta aðrar lærarar í lærugreinunum at vera vegleiðarar. Talan kann tá t.d. vera um, at aðrir lærarar hava serligar førleikar í evninum, sum breytarverkætlanin viðger, ella at fyribyrgja, at arbeiðsbyrðan hjá ávísum lærarum verður ov tung.

Tað er skúlans uppgáva at skipa vegleiðingina. Innleiðandi vegleiðingin eigur at vera grundleggjandi, soleiðis at næmingurin fær eyga á evni og fakligt samanspæl. Vegleiðingin skal leggjast soleiðis til rættis, at næmingurin fær vegleiðing í øllum liðum í arbeiðinum við breytarverkætlanini, heilt frá fyrstu hugsanum um lærugrein og evni til innlating, herímillum at avmarka evnið, at gera uppgávuorðingina og at arbeiða við og skriva breytarverkætlanina.

Hetta kann skipast soleiðis, at hvør næmingur fær útlutað eitt ávíst tal av vegleiðingartímum. Í hesum høpi er týdningarmikið, at vegleiðararnir forklára fyri næmingunum, at tey skulu møta fyrireikað til vegleiðingartímarnar og møguliga lata vegleiðarunum ávegistilfarið, sum vegleiðing ynskist í, frammanundan.

Tað er týdningarmikið, at vegleiðararnir skilja greitt ímillum vegleiðaraleiklutin og próvdómaraleiklutin. Ein vegleiðari kann gott lesa ávegistilfar og smáar partar av

breytarverkætlanini, men endamálið skal altíð vera vegleiðing. Vegleiðingin kann bæði vera faklig og fevna um sjálva arbeiðsgongdina, so sum hvussu uppgávuorðingin skal skiljast, og hvussu ymsu lærugreinarnar skulu nýtast. Uppgávan hjá vegleiðaranum er at fáa næmingin at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt.

Vegleiðarin skal bara vegleiða og skal ikki gera nakra ávegis meting av breytarverkætlanini ella geva ávegis próvtal. Endamálið við at hava greiðan skilnað millum vegleiðing og próvdøming er at tryggja, at vegleiðari og próvdómari eru óheftir, tá breytarverkætlanin skal próvdømast.

Vegleiðingartilgongdin kann skipast soleiðis:

1. Lærarar í viðkomandi lærugreinum greiða yvirskipað frá møguleikunum í lærugreinunum, soleiðis at næmingarnir hava eitt grundarlag til at velja fakligt øki og lærugreinar. Skilagott er í sama viðfeingi at lata næmingarnar síggja nøkur dømi um uppgávuorðingar umboðandi ymisk faklig øki.

2. Næmingurin skal í samráð við vegleiðararnar velja fakligt øki og lærugreinar, sum vegleiðararnir skulu góðkenna. Fyri at tryggja, at góður samanhangur er millum valda fakliga økið og samansetingina av lærugreinum, er týdningarmikið, at næmingurin beinanvegin tosar við vegleiðararnar um faklig øki, soleiðis at góð tíð er til at skifta fakligt øki ella lærugrein, um tað verður mett neyðugt. Í hesum sambandi er týdningarmikið, at lærarar í báðum lærugreinunum, sum væntandi vera í breytarverkætlanini, eru við í vegleiðingartilgongdini beinanvegin. Soleiðis kann sleppast undan, at næmingurin brúkar óneyðuga tíð til at arbeiða við einum fakligum øki, sum ikki verður góðtikið, ella sum ikki nóg væl kann standa mát við krøvini í síðsta enda.

3. Síðan kemur næmingurin í samráð við vegleiðararnar nærri eini avmarking av fakliga økinum og eini uppgávuorðing. Í hesum sambandi verður mælt til, at næmingurin tíðliga í gongdini ger eitt skrivligt upprit, har hann/hon avmarkar fakliga økið, ger uppskot til evni og lærugreinar, og hvat tilfar kann brúkast.

4. Við støði í vegleiðingunum og tilfarinum hjá næminginum orða vegleiðararnir endaligu uppgávuorðingina. Uppgávuorðingin skal verða soleiðis orðað, at næmingurin ikki frammanundan kann hava svarað henni út í æsir. Hinvegin skulu tankarnir, sum næmingurin hevur gjørt sær í vegleiðingargongdini, síggjast aftur. Uppgávuorðingin skal tryggja, at næmingurin kann fara fakliga í dýpdina og seta seg inn í nýggj faklig øki. Saman við uppgávuorðingini skal næmingurin fáa at vita væntaða vavið av uppgávusvarinum. Vanliga verður roknað við 15-20 síðum (á 2400 sløg) frá inngangi til og við niðurstøðu.

5. Restina av vegleiðingini, so sum tíðspunkt og fyrireiking til vegleiðingina, avtala næmingur og vegleiðarar sínámillum. Fyri at fáa sum mest burturúr, eigur næmingurin at hava smá skrivlig upprit við til vegleiðingina. Vegleiðararnir kunnu við atliti at stigvøkstri áseta krøv til uppritini – frá stikkorðum og leysum tankum til meira útgreinaða ætlan við keldutilfari, háttaløgum og fakligum spurningum.

   Í sjálvari vegleiðingargongdini eigur næmingurin at vera stigtakarin. Næmingurin skal koma við spurningum, skipa tilfarið og finna keldutilar. Leikluturin hjá vegleiðarunum er at vísa á styrkir og veikleikar, aðrar møguleikar at skipa tilfarið og ymisk sjónarhorn. Partar av vegleiðingini kunnu væl vera við telduposti ella líknandi.

Tað kann eisini vera skilagott, at næmingarnir hava smáar framløgur um breytarverkætlanina fyri hvørjum øðrum. Tílíkar smáar framløgur kunnu vera við til at fáa nýggj sjónarhorn fram og økja um fakliga neyvleikan.

At enda kunnu vegleiðararnir vegleiða í felag um formlig viðurskifti, so sum inngang, niðurstøðu, stuttan samandrátt á enskum, ávísingar, sitat, bókmentalista, fylgiskjøl o.s.fr.

6. Í sjálvum verkætlanartíðarskeiðinum hevur næmingurin eisini rætt til vegleiðing. Umframt avtalaða vegleiðing millum vegleiðarar og næming, kunnu vegleiðarar áseta nøkur tíðspunkt, har teir eru tøkir, antin á skúlanum ella á telduposti ella líknandi. Fyri at tryggja øllum næmingum javnbjóðis atgongd til vegleiðing, kann skúlin áseta mannagongdir fyri vegleiðing.

Mælt verður til, at faklærarar skifta orð um og samanbera ymisk uppskot til uppgávuorðingar. Hetta kann vera við til at skapa eina felagsfatan millum lærarar av fakligum krøvum til breytarverkætlanina

*Næmingurin velur í samráði við sín/ar vegleiðara/r øki og greiðsluevni fyri verkætlanina. Økið og fakliga greiðsluevnið skulu liggja innan fyri kjarnaøkini ella ískoytisøkini í lærugreinunum og skal avmarkast soleiðis, at til ber at gera eina uppgávuorðing, so at áður innlatin og rættað svør/uppgávur ikki kunnu endurnýtast.*

Er talan um breytarverkætlan, sum verður skrivað í einari ella fleiri enn tveimum lærugreinum, er tað skúlaleiðslan, sum skal góðkenna valini.

Valini av lærugreinum og fakligum øki til breytarverkætlanina hanga sum oftast saman. So vítt gjørligt, skulu ynskini hjá næminginum gangast á møti, men næmingurin kann ikki krevja at sleppa at skriva í ávísum fakligum øki. Tíðliga í vegleiðingini kunnu avbjóðingar koma, t.d. at evnið ikki í nóg stóran mun er fevnt av valdu lærugreinunum. Um so er, má næmingurin antin velja sær annað fakligt øki ella aðra lærugreinasamanseting. Hinvegin skal fakliga øki ikki avmarkast ov nógv beinanvegin. Við vegleiðingini, sum kemur, verður økið avmarkað, soleiðis at ein beinrakin uppgávuorðing kann orðast. Uppgávan hjá vegleiðarunum er at tryggja, at næmingurin arbeiðir við eini breytarverkætlan, har møguleiki er at koma til botns fakliga.

Týdningarmikið er, at næmingurin og vegleiðarar umrøða ætlanirnar hjá næminginum gjølla beinanvegin. Hetta fyri at tryggja, at næmingurin ikki brúkar óneyðuga orku at arbeiða við einum evni, sum tað seinni vísir seg, ikki verður góðtikið. Uppgávan hjá vegleiðarunum er at tryggja, at næmingurin arbeiðir við eini breytarverkætlan, har møguleiki er at koma til botns fakliga.

Vegleiðararnir skulu tryggja, at næmingurin veit, at hann/hon ikki beinleiðis kann endurnýta egið tilfar, sum hevur verið innlatið og eftirmett. Næmingurin kann tó arbeiða víðari við ella vísa til egið tilfar, sum hann/hon hevur latið inn áður. Eitt nú kann næmingurin arbeiða við støði í eini uppgávu ella rapport, sum hann/hon longu hevur latið inn, og fara í dýpdina við einum evni ella fakligum øki, men um upplýsingar frá hesum tilfarinum verða brúktar í breytarverkætlanini, skal kelduávísing gerast, so tað er greitt, at upplýsingarnar ikki eru fingnar til vega í arbeiðinum við sjálvari breytarverkætlanini.

Mælt verður til, at skúlin ger eitt oyðublað til næmingarnar at velja lærugreinar og faklig øki. Oyðublaðið skal útfyllast við navni á næminginum, valdu lærugreinunum og fakligu økjunum. Vegleiðararnir vátta við undirskrift, at lærugreinar og øki eru umrødd og verða góðkend.

*Vegleiðari/vegleiðarar gera uppgávuorðing næmingsins.*

Vegleiðararnir orða endaligu uppgávuorðingina. Endamálið við uppgávuorðingini er at skilmarka og áseta innihaldið í uppgávusvarinum. Atlit skulu takast at, at ymsu lærugreinirnar hava ymsar siðvenjur. Uppgávuorðingin skal eisini samsvara tí fakliga støði, sum eyðkennir eina gymnasiala miðnámsútbúgving.

*Uppgávuorðingin skal fevna um faklig og tvørfaklig evni í lærugreinunum, og eitt krav er, at farið verður í dýpdina í minsta lagi aðrari av lærugreinunum, út um tað, sum vanliga krevst í lærugreinini.*

Uppgávuorðingin skal bæði fevna um fakliga dýpd og tvørfaklig krøv. Uppgávuorðingin skal sostatt verða orðað soleiðis, at hon kann svarast til lítar við amboðum og fakligari vitan úr avvarðandi lærugreinum.

Kravið um at koma fakliga til botns kann uppfyllast á ymsar hættir, alt eftir ymsu lærugreinunum. At koma til botns fakliga kann vera at:

- næmingurin vísir evni til sjálvstøðugt at seta seg inn í nýggj faklig øki
- næmingurin grundgevur fyri valdum háttalagi og kjakast um aðrar arbeiðshættir
- næmingurin grundgevur fyri og greiðir frá valdum tilfari
- næmingurin greinar eitt evni/úrslit við støði í ástøði
- næmingurin metir um og greinar úrslit frá royndararbeiði ella kanningararbeiði
- næmingurin greiðir frá og setir funnu samanhangirnar í frásjón
- næmingurin greinar ymisk tekstsløg og samskifti
- næmingurin setur partar av ritverki ella ávísari bókmentaligari stevnu í frásjón

*Uppgávuorðingin*

- *skal vera ítøkilig og avmarkað*

Ein yvirskrift er ikki nóg mikið sum uppgávuorðing. Vanligt er, at uppgávuorðingin hevur fleiri spurningar samsvarandi ymiskum taksonomiskum stigum. Týdningarmikið er tó, at uppgávuorðingin ikki fer ov nógv í smálutir, soleiðis at næmingurin ikki fær møguleika at vísa síni evni til sjálvstøðugt at skipa tilfarið og evnið. Næmingurin skal kunna nágreina og tulka uppgávuorðingina sjálvstøðugt. Eitt nú kann leggjast upp til greiðsluevni, har næmingurin sjálvur tekur viðkomandi avgerðir.

Orðingarnar skulu vera somikið greiðar, at næmingurin ikki ivast í, hvørji krøvini til uppgávusvarið eru. Eitt nú kann tað vera tilskilað í uppgávuorðingini, hvørji ítøkilig verk skulu viðgerast, og hvat royndar- ella kanningararbeiði skal gerast. Orðingar við orðum sum 'kann' og 'møguliga' kunnu skapa óneyðugan iva um dømingargrundarlagið.

Orðingar, har næmingurin sjálvur skal taka eina avgerð og grundgeva fyri henni, geva næminginum møguleika at vísa fakligar og háttalagsførleikar.

- *og í neyvum orðingum lýsa, hvat kravt verður av næminginum, millum annað vavið av uppgávuni,*

Vavið av uppgávusvarinum er ikki ásett í námsætlanini. Fleiri viðurskifti kunnu hava ávirkan á vavið, so sum uppgávuorðingin og siðvenjur í ymsu lærugreinunum. Vanliga verður tó roknað við 15-20 síðum (á 2400 sløg) frá inngangi til og við niðurstøðu. Saman við uppgávuorðingini skal næmingurin

fáa kunning um væntaða vavið av uppgávusvarinum. Tað er týdningarmikið at gera næminginum greitt, at tað ikki í sær sjálvum gevur góðan karakter at lata nógvar síður inn.
Hóast fakliga tyngdin kann liggja meira í aðrari lærugreinini enn hinari, so skal tað vera greitt í uppgávuorðingini, at báðar lærugreinirnar skulu vera við til at náa fakligu málunum.

- *Umframt nøkur viðurskifti – møgulig fylgiskjøl – sum ikki hava verið viðgjørd í vegleiðingini, skulu vera við.*

Uppgávuorðingin skal fevna um nøkur viðurskifti, sum næmingurin ikki kennir frammanundan. Hetta fyri at næmingurin ikki skal kunna svara allari uppgávuorðingini frammanundan uppgávutíðarskeiðinum. Hetta kann t.d. gerast við ókendum fylgiskjølum, sum næmingurin skal viðgera í uppgávuni. Ansast skal tó eftir, at møgulig fylgiskjøl ikki verða ov stýrandi fyri uppgávusvarið. Hinvegin kunnu fylgiskjøl fyribyrgja, at næmingurin plagierar. Krøv um royndararbeiði í verkætlanartíðarskeiðinum og viðgerð av svarunum kunnu eisini vera ókend viðurskifti, sum næmingurin ikki kennir frammanundan.

- *skal gera tað møguligt hjá næminginum at liva upp til endamálið við verkætlanini*

Uppgávuorðingin skal orðast soleiðis, at næmingurin við uppgávusvarinum fær møguleika at náa settu førleikamálunum fyri breytarverkætlanina.

- *skal vera lagað soleiðis til tíðarkarmarnar, at næmingurin hevur ein reellan møguleika at svara nøktandi og til fulnar*
- *skal vera skipað soleiðis, at næmingurin ikki frammanundan kann hava havt møguleika at skriva partar av uppgávuni niður í smálutir*
- *skal hava atlit at teimum hugsanum, ið næmingurin hevur gjørt sær, áðrenn skrivitíðarskeiðið byrjar*

Atlit skal takast at samskiftinum, sum hevur verið millum næming og vegleiðarar um uppgávuorðingina, soleiðis at javnvágin millum tað kenda og ókenda verður hóskandi. Og at næmingurin ikki frammanundan kann svara uppgávuorðingini út í æsir.

*Næmingar, sum hava valt sama øki, skulu hava ymiskar uppgávuorðingar. Uppgávuorðingin kann ikki vera beinleiðis partur av tí, sum næmingurin hevur fingið undirvísing í. Har aftur ímóti er einki sum forðar fyri, at verkætlanin er framhald av tí, sum undirvíst hevur verið í ella hevur samband við tað.*

Fleiri næmingar kunnu velja sama øki og evni, men uppgávuorðingarnar skulu tá vera ymiskar. At fleiri næmingar arbeiða við tí sama gevur møguleikar fyri samskifti og vitanardeiling, men næmingarnir skulu ikki kunna arbeiða saman um sjálvt uppgávusvarið ella partar av tí.

Næmingurin skal havi høvi til at vísa sjálvstøðugt arbeiði í breytarverkætlanini, og uppgávuorðingin má tí ikki byggja beinleiðis á fakligt tilfar, sum longu er gjøgnumgingið í undirvísingini. Um so er, at næmingurin kann skriva týðandi partar av breytarverkætlanini bert við at halda seg til tilfar, sum longu er viðgjørt í undirvísingini, so stendur uppgávurorðingin ikki mát við settu krøvini í námsætlanini.

Tað ber tó væl at arbeiða víðari í breytarverkætlanini við einum evni, sum hevur verið viðgjørt í undirvísingini. Tað kundi eitt nú verið, at ein næmingur í undirvísingini fær íblástur til at arbeiða víðari við onkrum ávísum. Og næmingurin kann sjálvandi brúka háttaløg og ástøði frá undirvísingini í breytarverkætlanini.

*Uppgávusvarið skal vera á føroyskum, men skúlin kann í serstøkum førum eftir umsókn loyva, at svarað verður á øðrum máli.*

Áðrenn skúlin loyvir næmingi at skriva á øðrum máli enn føroyskum, má hann tryggja, at vegleiðararnir hava nóg góðar málsligar førleikar at orða uppgávuorðingina og at meta um verkætlanina.

*Har aftur ímóti skulu allar verkætlanir hava ein stuttan samandrátt (abstract) á enskum.*

Samandrátturin skal vera stuttur og skal í einum samanhangandi teksti greiða frá týdningarmestu táttunum í uppgávusvarinum. Samandrátturin skal kunna lesast og skiljast, uttan at tað er neyðugt at hava lisið uppgávusvarið. Samandrátturin er vanliga millum 10 og 20 reglur og er á fyrstu síðu eftir forsíðuna. Samandrátturin eigur at fevna um eina lýsing av evninum, týdningarmestu úrslitini og niðurstøðurnar. Tað er skilagott at lata næmingarnar venja seg við at skriva slíkar stuttar samandráttir í undirvísingini.

*Er eitt ella fleiri fremmandamál partur av breytaverkætlanini, skal í minsta lagi ein partur av keldutilfarinum vera á tí/teimum málunum.*

Fremmandmálsliga tilfarið skal fylla somikið í vavi og fakligari tyngd, at til ber at eftirmeta sambært førleikamálunum í fremmandmálsligu lærugreinini. Næmingurin skal eisini í hóskandi mun sitera úr fremmandmálsliga tilfarinum á fremmandamálinum sjálvum.

# Metingargrundarlag

*Verkætlanin verður dømd við einum próvtali, sum byggir á eina heildarmeting, t.v.s. í hvønn mun svarið lýkur málini fyri breytaverkætlanina.*

*Uppgávur, ið eru skrivaðar á øðrum máli enn føroyskum, skulu lúka somu málsligu krøv, sum verða sett til eina føroyska uppgávu.*

At talan er um heildarmeting merkir, at tað ikki ber til bert at leggja størsta dentin á eitt av settu málunum, eins og tað heldur ikki ber til at avgera frammanundan, hvussu málini skulu vektast. Bygnaðurin av verkætlanini og málsliga framsetingin skulu altíð takast við í metingina – óansæð hvørjar lærugreinarnar eru.

Er verkætlanin bert skrivað í einari lærugrein skal, umframt vanliga metingargrundarlagið, eisini leggjast dentur á, um ymiskir fakligir arbeiðshættir eru brúktir, og í hvønn mun næmingurin megnar at fara fakliga til botns í evninum.

Sjálvt um málini fyri verkætlanina eru grundarlag undir metingini, so er umráðandi at metingin er á einum realistiskum støði í mun til útbúgvingina og tíð og tilfar, sum hevur verið næminginum tøkt.

Samsvar skal vera millum uppgávuorðing og uppgávusvar. Eisini hesum viðvíkjandi skal talan vera um heildarmeting. Sostatt skal ikki tað frammanundan vera avgjørt, hvar denturin skal liggja. Ein minni góð uppgávuorðing kann gera tað trupult hjá næminginum at røkka málunum fyri breytarverkætlanina. Næmingurin hevur ábyrgdina av at náa málunum, men samstundis er týdningarmikið at hava í huga, at samsvarið millum uppgávusvar og uppgávuorðing er ein partur av heildarmetingini.

Viðhvørt eru nógv fylgiskjøl við í uppgávusvarinum. Fylgiskjølini skulu ikki metast í sær sjálvum. Metingin liggur í, hvussu tey eru tikin við og brúkt í uppgávusvarinum.

Metir próvdómari ikki, at uppgávuorðingin er nøktandi, t.d. tí hann/hon ikki metir hana geva næminginum møguleika at náa settu málunum, skal hann/hon venda sær til skúlaleiðarar á skúlanum hjá næminginum sambært §25, stk 7 í Próvtøkukunngerðini.

Í breytarverkætlanum, har onnur ella báðar lærugreinirnar eru fremmandamál, skal í minsta lagi ein partur av keldutilfarinum verður á fremmandamálinum/-málunum. Metast skal um, um næmingurin megnar at nýta fremmandmálsliga keldutilfarið í nóg stóran mun. Um keldutilfar á fremmandamálinum/-málunum ikki er brúkt, er talan ikki um eitt fullfíggjað uppgávusvar. Hvussu nógv hetta skal viga í endaligu metingini, veldst m.a. um uppgávuorðingina.

Tá royndararbeiði er við í breytarverkætlanini, skal tað í metingini takast atlit at, hvussu royndararbeiðið verður tikið við. Metingin er ein heildarmeting og atlit skal takast at, hvussu nógva tíð næmingurin hevur havt til royndararbeiðið.

Uppgávusvarini skulu hava stuttan samandrátt á enskum við. Um eitt uppgávusvar ikki hevur samandráttin við, er uppgávusvarið ikki fullfíggjað. Metingin av samandráttinum ella vantandi samandráttinum er partur av heildarmetingini. Vantandi samandráttur er eitt lýti, men tað er ikki nóg mikið í sær sjálvum til, at breytarverkætlanin ikki stendur.

Annar av vegleiðarunum og próvdómarin, sum umboða hvør sína av lærugreinunum, meta um uppgávusvarið og áseta eitt próvtal. Próvtalið skal vera givið við støði í eini heildarmeting.

Verða vegleiðari og próvdómari ikki samdir, geva teir hvør sítt próvtal. Próvtalið fyri uppgávusvarið verður so miðaltalið av báðum próvtølunum, rundað til næsta próvtalið í próvtalsstiganum. Er miðaltalið mitt millum tvey próvtøl, er próvtalið hjá próvdómaranum avgerandi (vísandi til §7, stk. 2 í kunngerðini um próvtalsstiga og døming í gymnasialu miðnámsútbúgvingunum).